**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Svartkalvi. Túrur nr. 1754.**
**Tíðarskeið: 21/10 - 3/11 – 2017.**

**Fólk við frá Havstovuni:** Jens Arni Thomassen, Marit Pedersen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund (kanningarleiðari).

**Endamál:** Hetta er fyrsti túrur, har roynt hevur verið eftir svartkalva so seint á árinum. Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna svartkalva: Nøgd, longd, vekt, aldur, kyn og kynsbúning. Umframt skuldu kanningar eisini gerast av øðrum fiskasløgum, sum vóru fingin.
Eisini var hitin við botn skrásettur. Nytruprøvar vóru tiknir av svartkalva, toski, upsa, longu, blálongu og brosmu og magar í summum førum.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 135 mm posa, rockhopper grunnur, breitlar 120 m og Vágshurðar. Trolað varð vanliga í umleið 6 tímar. Miniloggarar vórðu nýttir til at máta sjóvarhita í trolinum.

**Um túrin:**
Fóru av Havnini leygardagin 21/10 umleið kl. 22 og byrjaðu at royna í kantinum norður-eystur úr Fugloy. Vit royndu í kantinum eystanfyri, serliga nærhendis kaðalinum, sum er eystan fyri Suðuroyarbanka. Vit gjørdu eitt legg í vestara kant av Munkagrunninum og suður á endan á Munkagrunninum. Vóru á Havnini eftir loknan túr fríggjadagin 3/11 kl. 07 og landaðu á Bacalao. Tilsamans 28 hál vórðu góðkend og gjørd upp. Veðrið var sum heild gott tó at vit lógu bakk í ein dag.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu og nytrur (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 3. november 2017.

**Fyribilsúrslit:** Við tað, at hetta er fyrsti túrur, har roynt hevur verið eftir svartkalva so seint á árinum, eru eingi onnur ár at samanbera við. Ein samanbering er tó gjørd við nøgdina á samasvarandi túri í mai-juni 2017. Veiðan av svartkalva var bert umleið helvtin í mun til mai-juni, men 57% meira varð fingið av trantkongafiski. Nøgdin av blálongu var 18 ferðir størri enn í mai-juni og eisini var nógv meira at fáa av halahvøssu skøtu og hvítuskøtu. Føðin hjá svartkalva var í høvuðsheitum svartkjaftur, tó í minni nøgdum enn í mai-juni. Svartkalvin vaks umleið 2,9 cm um árið. Hitin við botn lá millum 0$^{o}$ og 5$^{o}$ C.

**Talva 1**. Veiða (kg), og nytrur/magar tikin á túri 1754.

| FISKASLAG | Oktober 2017 KG, 28 hál | Nytrur | Magar | Mai-juni 2017 KG, 31 hál | Lutfall KG per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| SVARTKALVI | 7349.306 | 245 | 162 | 14219.071 | 0.57 |
| TRANTKONGAFISKUR | 5601.875 | | | 3956.104 | 1.57 |
| TINDASKOETA | 4201.304 | | | 1747.798 | 2.66 |
| BLALONGA | 2790.776 | 111 | 35 | 171.395 | 18.03 |
| HALAHVASSA SKOETA | 1235.343 | | | 296.83 | 4.61 |
| LONGA | 916.998 | 39 | 2 | 42.610 | 23.83 |
| STORI KONGAFISKUR | 741.599 | | | 540.975 | 1.52 |
| HVITASKOETA | 310.364 | | | 27.485 | 12.50 |
| TOSKUR | 273.554 | 10 | 10 | 410.340 | 0.74 |
| ISHAVSSKOETA | 247.911 | | | 0 | |
| HAVTASKA | 191.835 | | | 107.150 | 1.98 |
| BROSMA | 128.395 | 38 | | 314.020 | 0.45 |
| LALLA | 94.970 | | | 146.105 | 0.72 |
| GULLAKSUR | 77.163 | | | 62.275 | 1.37 |
| UPSI | 63.32 | 3 | | 205.320 | 0.34 |
| BLAGOMUR | 62.502 | | | 25.467 | 2.72 |
| SVARTKJAFTUR | 57.012 | | | 144.308 | 0.44 |
| AGNHOEGGUSLOKKUR | 40.071 | | | 3.470 | 12.79 |
| KLINGRUSKOETA | 26.543 | | | 38.425 | 0.76 |
| HALIPHRON ATLANTICUS | 15.830 | | | 0 | |
| LITLI KONGAFISKUR | 14.128 | | | 18.749 | 0.83 |
| HVASSASPREK | 13.143 | | | 44.805 | 0.32 |
| SKADDUR FISKUR | 12.669 | | | 0 | |
| GAMAL FISKUR | 10.965 | | | 26.458 | 0.46 |
| MEDUSAHØVD | 8.667 | | | 0 | |
| LIRI | 8.405 | | | 5.305 | 1.75 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 3.554 | | | 0 | |
| TRØLLAKRABBI | 3.015 | | | 0.595 | 5.61 |
| LITLA BROSMA | 2.445 | | | 11.833 | 0.23 |
| OSTUR GEODIA SP | 1.865 | | | 0 | |
| HVALSPYGGJ | 0.950 | | | 0 | |
| KRYTTLINGUR | 0.430 | | | 0.580 | 0.82 |
| LITLA LAKSATOBIS | 0.371 | | | 0.247 | 1.66 |
| ULVFISKUR | 0.160 | | | 3.290 | 0.05 |
| TILSAMANS | 24507.438 | 446 | 209 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru at finna í dokumentinum Tur1754d.doc.

Petur Steingrund